skemt

# Ógvuslig konsert

Tað tóktist, sum at okkurt heilt serligt ljóðføri var á lofti, tá ið konsert var í Vestmanna farna vikuskiftið. Í øllum førum kundi hendan greinin á portalinum givið ábendingar um tað. Vónandi var bara bland komin í onkrar myndir.


31. mar 2008, 14:57

**Ákærdur fyri drápsroynd**

Ein 21-ára gamal maður er stevndur fyri eitt nevningating. Rættarsakin verður eina heila viku, og maðurin er ákærdur fyri drápsroynd

31. mar 2008, 17:05

**Konsert í Vestmanna**

Ungdómshúsið STAÐIÐ í Vestmanna skipar hóskvøldið 3. apríl fyri útgávukonsert við guitarspælaranum Benjamin Petersen og øðrum kendum nøvnum

31. mar 2008, 17:21

**Aftur danskt mannfall í Afghanistan**

Danmark misti aftur í dag ein hermann í Afghanistan

# Orna líka fruntin

Ríku fólkini kunnu nakað, sum vit onnur ikki kunnu. Her er tað Paris Hilton, sum er kend fyri at verða kend, ið fær hjálp við hárinum hjá sær, áðrenn hon skal í turkiskt sjónvarp. Eitt hjálparfólk hjá henni tekur sær væl av fruntinum. Vit kunnu so bara undrast á, at hon klárar at sita so frætt still.





# Ikki hyggja upp um akslarnar

Hesin maðurin dámar ikki, tá ið fólk hyggja upp um akslarnar á honum. Tað er The Undertaker, sum í næstu løtu syftir Edge eftir gólvinum í b oksiringinum, har Wrestlemania fór fram vikuskiftið. Hetta er eitt stórt undirhaldstiltak, sum er einaferð um árið í USA, og har gongur tað harðliga fyri seg í stríðunum millum wrestlarnar.
Mynd: Polfoto

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**So er alt, sum tað skal vera**
Ólavur Presley afturkomin
www.nordlysid.fo

**Skribentur í sjampanjuhýri**
Dimma.fo og Dimmalætting ynskja Stjørnuni hjartaliga til lullukku við føroyameistaraheitinum
Dimma.fo

**Hvat høvdu tey væntað?**
Mona Simonsen svam í evstu løtu undir kravtíðina til HM
www.uf.fo

**Er hann á lívi?**
Nú Shakespeares fyllir 444 ár, verða 35 sjónleikaframførslur leiktir samstundis um allan heimin
Vikublaðið

**Teir stóru spurningarnir**
Trúgv og føroyskt fíggjareftirlit
Johan Dahl í viðmerking

# Klippa tey á Cypros?




Føroyska hondbóltsferðalagið, sum var á Cypros seinastu vikuna, kannaði ikki eftir, um skipanin við klippum í koyrikorti eisini var galdandi á oynni. Men um so var, so stendur eigarin av hesum bilinum væl til eitt av slagnum. Stóra skeltið við parkeringsforboðnum hevði til endamáls at tryggja, at bussar við hotel-gestum sluppu framat høvuðsdyrnum. Men sum sæst, so var tó ikki altíð, at skeltið hevði ætlaðu effektina

Sosialurin